

## Framhald av Talent komið

Í nýggja Svarta Kassanum, sum er framhald av Talent, sleppa børn og ung á ein hugtakandi og stuttligan hátt at tekna, evna, spæla leiklutir og royna sína vitan og víðka sjónarringin, verður sagt í skrivi frá teimum, sum standa aftanfyri spælið Talent. Svarti Kassin er ein lættari útgáva av spælinum. Talent er upprunaliga gjørt sum eitt familjuspæl og at spæla í liðum, men Svarti Kassin er eisini góður í skúlahøpi, tí nógva av tilfarinum er læruríkt og hóskar væl í lærugreinum sum leiklist, evning, landalæru og søgu. Eisini riggar tilfarið væl til góðar innihaldsríkar spurnarkappingar og hugnaløtur.Fyri at fáa fulla úrtøku av Svarta Kassanum er tað best at hava uppruna útgávana av Talent, verður sagt. Tað er felagið Talent.fo sum hevur gjørt spælið og eisini evnað tær mongu uppgávurnar, avbjóðingarnar og spurningarnar, sum eru at finna í Svarta Kassanum.

# uttan ávaring




*Nú ber ikki longur til at gjalda við Visa Elektron um náttina. Uttan at hava boðað nøkrum frá, hava peningastovnarnir gjørt av at læsa kortini frá klokkan 2 til 5.30. Peningastovnarnir siga at eingin fráboðan var neyðug, tí tað stóð longu í brúkarareglunum*

yvirtrekkja kortið við keypi á internetinum ella í kaféum og ørðum. Hetta tí at peningastovnarnir, sjálvt um teir søgdu í brúkarareglunum at kortið ikki kann nýtast sum gjaldskort hesar tímarnar, loyvdu at kortið kundi nýtast sum vanligt.

### Misbrúktu vindeygað

Sambært Øssur Nolsøe, deildarstjóra hjá Eik í Suðurstreymoy, er orsøkin til at peningastovnarnir nú tátta í, at teir sóu at alsamt fleiri við vilja valdu at brúka hetta vindeygað, meðan saldoeftirlitið var niðri, til at keypa við kortunum, sjálvt um eingin peningaligur dekningur lá aftanfyri. Hetta var serliga galdandi fyri keypi á heimasíðum.

- Vit marknaðarførdu kortið uppá at tað ikki bar til at yvirtrekkja kortið, og vit valdu at tátta í tá vit sóu at hesin trupulleikin stakk seg upp, sigur Øssur Nolsøe, deildarstjóri hjá Eik í Suðurstreymoy.



*Kanska hevur tú longu verið í hesi støðuni. Tú hevur longu smakkað tær á ølina, bitið í pitsuna ella situr í hýruvogninum, men fært síðan at vita, at kortið verður avvíst. Tú veit at peningur er tøkur, og seljarin veit at terminalurin er í lagi, men hvørgin veit, at bankarnir í veruleikanum hava læst kortið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Hýruvognarnir hava ongantíð fingið nøkur boð um, at Visa Elektron ikki longur hevur nakran dekning um náttina. Fleiri hýruvognar taka ikki móti Visa Elektron longur*

## Púra nýtt fyri mær

**Tá vit ringdu til Petur Splidt, stjóra í Auto, gjørdist hann ikki sørt bilsin, tá vit greiddu honum frá, at Visa Elektron ikki kann nýtast um náttina. – Hatta visti eg ikki, sigur bilstjórin, tá vit greiða honum frá støðuni**

GJALDSKORT
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Síðan 24. november hevur ikki verið gjørligt at nýta Visa Elektron um náttina. Nakrir av teimum, ið hava stórst nýtslu av hesum kortunum um náttina, eru hýruvognsførarar. Serliga verður tað nógv brúkt í vikuskiftunum, tá nógv ung fólk eru í býnum. Men tá vit ringdu til Petur Splidt, stjóra í Auto, at spyrja, hvussu teir hava merkt hesa broytingina, visti hann av ongum.

- Hatta visti eg als ikki av. Tað ljóðar mær eitt sindur undarligt, at vit ikki hava fingið nakra fráboðan um at Visa Elektron ikki kann nýtast um náttina longur. Vit hava 34 terminalar, ið allir kunnu taka Visa Elektron, og eg vildi bara hildið at mann fekk okkurt at vita, tá ein slík broyting verður gjørd, sigur Petur Splidt.

Sambært stjóranum hava teir ikki havt stórvegis trupulleikar av hesum enn, men kemst tað nokk av at fólk sum oftast hava somikið av leysum á sær, at tey fáa goldið kontant, tá kortið ikki riggara.

- Men eisini hava okkara bilførarar verið rættiliga stórsinnaðir og latið fólkum eina rokning, soleiðs at tey kunnu koma oman í Auto dagin eftir at gjalda, um kortið ikki riggaði og tey einki leyst høvdu á sær. Kanska tí hava vit ikki havt nakað serligt tap av tí enn, greiðir Petur Splidt frá.

## GEVIÐ GÆTUR

Í greinunum á hesum síðum verður bert tosað við Gunnar Nolsøe, deildarstjóra hjá Eik í Suðurstreymoy sum umboð fyri peningastovnarnar. Men talan er also um allar peningastovnarnar í Føroyum, sum hava stongt fyri nýtsluni, og er tað tí ikki bert Eik Banki, at talan er um.